# Viðtøkur
# fyri
# Grunn Torvald Poulsens á Steinum

Grunnurin er stovnaður sambært testamenti hjá Torvaldi Poulsen, og ber navnið

Grunnur
Torvald Poulsens á Steinum

**§ 1.**Stovnsfæ grunnsins er arvur eftir Torvald Poulsen á Steinum sambært testamenti hansara.

**§ 2.**Endamálið hjá grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki við listarligum hegni til útbúgving.

**§ 3.**Grunnurin verður stjórnaður av eini nevnd við trimum limum, sum eru

Rektarin á Fróðskaparsetri Føroya
Formaðurin í Listafólkasambandi Føroya (LISA)
Formaðurin í Føroya Lærarafelag
Rektarin á Fróðskaparsetrinum er nevndarformaður

Stk.2.Grunnurin verður teknaður av formanninum saman við einum øðrum nevndarlimi.

**§4.**Grunnsfæið skal umsitast á tryggasta hátt og til hægst møguliga rentu.

Stk.2.Ognir grunnsins mugu ikki skuldbindast.

**§ 5**.Stuðul verður veittur úr grunninum á føðingardegi Torvalds tann 8. februar, um skikkaður umsøkjari er. Stuðul kann veitast bæði sum sømdarpeningur og eftir umsókn.

Stk.2. Nevndin kann gera nágreiniligar reglur um treytir fyri stuðulsveitan.

**§ 6**.Grunnurin skal síggja til, at gravstað Torvalds verður røkt. Har skal vera svørur við blómuleykum undir. Eisini skal grunnurin seta gravstein yvir Torvald.

**§ 7.**Roknskapur grunnsins er álmanakkaárið. Tó gongur fyrsti roknskapur frá tí at skiftirætturin hevur goldið arvin til grunnin.

**§ 8.** Roknskapurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara.

**§ 9.**Til at broyta viðtøkurnar krevst ein samd nevnd. Tó kann endamálið ikki broytast.

Stk.2.Um broyttar tíðir ella broytt viðurskifti gera, at grunnurin ikki longur kann virka eftir endamálinum, kann ein samd nevnd taka hann av. Um so verður, skulu tær ognir, sum eru eftir, nýtast til frama fyri føroyska list eftir avgerð nevndarinnar.

**§ 10**.Hesar viðtøkur eru samtyktar á nevndarfundi tann 25. mai 1999.